# Lærlingur til byggimarknaðin í

360°

Vit søkja eftir lærlingi til byggimarknaðin at byrja skjótast gjørligt.

Í lærutíðini fært tú eina fjølbroytta og áhugaverda útbúgving/arbeiðsgongd innan handil.

Í 360° starvast 20 fólk, og sum lærlingur fært tú innlit í alskynd viðurskifti viðvíkjandi kundarøkt, sølu og innkeypi.

**Førleikakrøv:**
Tað er eitt krav, at lærlingurin hevur FHS-útbúgving, at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt og annars ert fyrikomandi og røkin.

Meira fæst at vita um starvið á tlf: 510808

**Umsókn:**
Skrivlig umsókn, skal vera okkum í hendi innan 15. August. Umsóknin skal sendast til:

360°

Postsmoga 3268 · 110 Tórshavn

# Køkurin er opin

**hvønn gerandisdag til kl. 22.30 og í vikuskiftinum til kl. 23.00.**

Rio Bravo Restaurant

**Tórsgøta 11**
**Tel. 31 97 67**
**www.riobravo.fo**

# Fólk søkist

**Vit søkja eftur smiðjun, stál skipasmiðjum, sveisarum, mekanikarum og líknandi til arbeiði í Noreg skjótast gjørligt.**

Arbeiði umfatar klassing, umvæling og nýgerð av boripallum, supplyskipum, nýbygningum o.ø. innan offshore ídnaðin.

Arbeiðstíðin er 4 vikur úti og 2 vikur heima.

Góð løn verður givin.

Meira fæst at vita um arbeiðið, umstøður og treytir við at ringja ella skriva til undirritaða felag.

OILWIND

**Pf. J. K. JOENSEN & SONUR**

Tlf 332 422 · Fax 333 222 · t-postur: oilwind@oilwind.fo

Uttanfyri arbeiðstíð kann ringjast til fartlf. 212 422

FVE **FISKIVEIÐIEFTIRLITIÐ**
Faroe Islands Fisheries Inspection

# Skrivstovufólk til Fiskiveiðieftirlitið

Søkt verður eftir skrivstovufólki til móttøkuna hjá Fiskiveiðieftirlitið, at byrja sum skjótast. Ert tú fyrikomandi og løtt/lættur at samstarva við, ert tú rætti persónurin til starvi.

**Starvið fevnir m.a. um hesar uppgávur:**
- Kunda- og telefonmóttøku
- Innsláðing av dagbókadata
- Avgreiðsla av mynstringum
- Annað fyrifallandi skrivstovuarbeiði

**Førleikakrøv:**
- Skrivstovuútbúgving, HH, HF ella aðra relevanta útbúgving
- Góðan førleika at samskifta á føroyskum og norðurlendskum
- Góð samstarvsevni

**Setanartreytir:**
- Starvsheitið er skrivstovufólk. Starvið er lønt í lønarflokki 2 sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið. Starvi er fulltíðarstarv.

**Umsóknir:**
Umsókn við avrit av prógvum, CV og møguligum viðmælum, skal verða Fiskiveiðieftirlitinum í hendi í seinasta lagi kl. 12.00 tann 14. aug. 2008.

**Fleiri upplýsingar:**
- Nærri fæst at vita um starvi við at venda sær til Fiskiveiðieftirlitið á tlf. 31 10 65.

# Stongt vegna summarfrí

GOURMET hevur í døgunum 27 juli til 10 august stongt vegna summarfrí

Gourmet

## Kømur til leigu í Klaksvík

Kømur við atgongd til køk við uppvaskimaskinu og mikroovni, stovu við sjónvarp og innbúgv, og toilet og bað, til leigu fyri 2.500 kr. mðr. við ljós og hita.

Atgongd er somuleiðis til vaskimaskinu og turkitrumlu.

**Nærri fæst at vita við at ringja á tlf. 222655**

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
Setursskrivstovan · tlf. 35 25 00
J. C. Svabos gøta 14 · Postrúm 272
110 Tórshavn · www.setur.fo

# Skrivstovustarv á Náttúruvísindadeildini

**Søkt verður eftir deildarskrivara til Náttúruvísindadeildina á Fróðskaparsetri Føroya. Starvið er fulltíðar skrivstovustarv.**

**Starvið**
Høvuðsuppgávurnar eru at:
- hava ábyrgd av dagliga virkseminum á deildarskrivstovuni
- hava ábyrgd av journalini
- hava dagligu fíggjarfyrisitingina á deildini
- fyrireika fundir og skriva fundarfrágreiðingar
- samskifta við studentar og lærarar
- annars alt vanligt skrivstovuarbeiði

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Hans Paula Joensen á tel. 35 25 00 ella á teldupostadressuni hanspj@setur.fo

**Setanartreytir**
Starvið verður sett frá 1. oktober 2008 ella skjótast til ber. Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið, 3. flokkur.

**Førleiki til starvið**
Vit vænta, at tú:
- hevur skrivstovuútbúgving ella tilsvarandi royndir
- hevur góðan málkunnleika, serliga í føroyskum
- hevur góðan førleika til at arbeiða sjálvstøðugt
- ert ábyrgdarfull/ur og røkin
- hevur góð evni at samskifta og samstarva við onnur
- hevur góðan telduførleika
- evni at laga teg til broyttar arbeiðsumstøður

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvum, CV og møguligum viðmælum skulu vera Náttúruvísindadeildini, Nóatún 3, Postrúm 2109, FO 165 Argir, í hendi í seinasta lagi mánadagin 25. august 2008.

# Stongt vegna summarfrí

Sjúkrakassin er stongdur vegna summarfrítíð.

Byrjað verður aftur til vanliga tíð mánadagin 25. august 2008.

Havnar
SJÚKRAKASSI